

# VÁPNA TRYGDAR SKEIÐ

# Vápnatrygdarskeið

# Innihald

**Kapittul 1: Inngangur og vápnalóg 4**
Inngangur ... 4
Skeiðsbygnaður ... 4
Vápnalógin og vápnaprógvið ... 4
Vápn í sambandi við ítrótt ... 4
Øll vápnalógin finst á hesari slóð: ... 4
Kunngerðin um at skráseta vápn: ... 4
Treytirnar fyri at standa skeiðið ... 4

**Kapittul 2: Vápnakunnleiki og vápnatrygd 5**
Luftbyrsur ... 5
Fjaðrabyrsur ... 5
Lufttrýstbyrsur (PCP-byrsur) ... 5
Kalibur og lóður ... 5
Trygd í sambandi við luftbyrsur ... 6
Høglbyrsur ... 6
Kalibur, boring o.a. ... 7
Kalibur ... 7
Boring og kjók (choke) ... 7
Kamarlongd og lóður ... 7
Kamarlongd ... 8
Lóður ... 8
Kalibur ... 8
Longd ... 8
Høglvekt ... 8
Høglstødd ... 8
Vanlig nýtsla av høglstøddum ... 9
Trýst ... 9
Tilfar ... 9
Yvir og undir og lið um lið ... 10
Hálvautomatisk byrsa og pumpgun ... 10
Skefti ... 10
Skjótiteknikkur ... 11
At taka byrsuna upp ... 11
At leggja uppfyri ... 11
Hvat eyga stýrir ... 11

**Kapittul 3: Vápnatrygd 12**
Upp- og afturlating av byrsu ... 12
Sikringin ... 12
Løðing og avløðing ... 12
At seta byrsu frá sær ... 12
Patrónfeilir ... 13
At boða frá trygd ... 14
Slit og óreglusemi ... 15

**Kapittul 4: Veiðilógin og trygd í sambandi við veiðu ... 16**
Fuglur ... 16
Friðing ... 16
Hara ... 16
Trygd í sambandi við veiðu ... 16
Trygd á sjónum ... 16
Á landi ... 17
Veiða við luftbyrsu ... 18
Djóravernd og náttúruvernd ... 18
Viðlíkahald av skotvápnum ... 19
Óhapp ... 19

**Kapittul 5: Verkligar venjingar og royndir 20**
Venjing 1 ... 20
Venjing 2 ... 20
Venjing 3 ... 20
Skotmynd ... 20
Verkliga royndin ... 20

Kapittul 1:
# Inngangur og vápnalóg

**Inngangur**
Hetta undirvísingartilfarið er lagt til rættis í sambandi við, at Løgtingið í 2015 samtykti broytingar í vápnalógini frá 1969, og er tað ætlað at nýta sum undirvísingargrundarlag á vápnatrygdarskeiði, sum verður kravt fyri at kunna søkja um at fáa vápnaprógv. Gamla vápnalóggávan - ella rættari gamla løgtingslógin um vápn - hevði sera fáar avmarkingar. Í høvuðsheitum høvdu allir myndugir persónar loyvi at eiga og nýta høglbyrsur, og um ein persónur, ið var fyltur 16 ár, fylgdist við einum, ið var fyltur 18, so hevði tann 16 ára gamli loyvi at nýta høglbyrsu. Hetta verður hildið ikki at vera tíðarhóskandi í dagsins samfelag. Broytingarnar seta tí strangari reglur fyri, hvør kann eiga og nýta vápn. Tó hevur dentur verið lagdur á ikki at gera reglurnar ov strangar, tí veiða í Føroyum er framvegis ein týðandi táttur av gerandisdegnum fyri nógv í samfelagnum, og ætlanin er ikki at leingja frástøðuna frá nútíðarsamfelagnum til føroysku náttúruna.

**Skeiðsbygnaður**
Trygdarskeiðið er býtt í tveir partar. Ein ástøðiligan part og ein verkligan part. Báðir partar enda við roynd, sum skal standast.

Tann ástøðiligi parturin tekur 6 tímar. Umframt at hugt verður at vápnalógini og veiðilógini, skulu skeiðsluttakararnir í ástøðiliga partinum læra, hvussu ymisku skotvápnini virka og um viðlíkahald av vápnum. Størsti denturin verður tó lagdur á trygdarviðurskifti, tá vit handfara vápn. At enda í ástøðiliga partinum skal skeiðsluttakarin í eini roynd prógva, at hann hevur skilt tær grundleggjandi meginreglurnar í sambandi við skótiteknikk og trygd og veit, hvat skotvápn kunnu nýtast til, og at hann veit, hvussu eitt skotvápn riggar.

Verkligi parturin tekur 3 tímar. Har skal skeiðsluttakarin venja at skjóta og handfara vápn trygt á skjótibreyt og í náttúru. Skeiðsluttakarin skal at enda prógva, at viðkomandi dugir at handfara skotvápnið trygt, og at viðkomandi dugir at skjóta. Verkligi parturin fer fram á eini av myndugleikunum góðkendari skjótibreyt. Tveir skjótivegleiðarar luttaka í senn í verkliga partinum.

**Vápnalógin og vápnaprógvið**
Í stuttum kunnu broytingarnar lýsast soleiðis, at størri krøv verða sett til, hvør ið kann ogna sær byrsu. Skalt tú eiga byrsu, so krevst eitt vápnaprógv. Hetta kanst tú fáa við at taka eitt góðkent vápnatrygdarskeið, ella um tú ert føddur fyri 1985. Hesar nýggju reglur skulu vera við til at fyribyrgja óhappum og við til at betra um djóravælveruna.

Tað er serliga §2 stk 1 til 4, sum er viðkomandi fyri okkum, sum hava áhuga fyri skjóting og skotvápnum. Lógin sigur, at øll vápn eru bannað í Føroyum, men tó eru nøkur undantøk. M.a. slættpípaðar høglbyrsur og lyftbyrsur. Um ein persónur er fyltur 18 ár og hevur tikið vápnatrygdarskeið, kann hesin eiga og nýta høglbyrsu. Persónur millum 16 og 18 ár kann ikki eiga byrsu, men um hann hevur tikið vápnatrygdarskeið, og hann er saman við persóni yvir 25 ár, sum hevur vápnaprógv, kann hann ganga við byrsu og brúka byrsu. Persónar, sum eru føddir í 1985 ella fyri tað, kunnu fáa vápnaprógv uttan vápnatrygdarskeið. Treytin er tó, at viðkomandi lógliga átti vápn fyri 1. januar 2016. Eisini verður viðmerkt á prógvið, at viðkomandi ikki hevur tikið vápnatrygdarskeiðið. Persónar, sum lógliga áttu vápn fyri 1. januar 2016, kunnu eiga hesi uttan vápnaprógv, um ætlanin ikki er at nýta hesi. Vápnini skulu tó skrásetast.

Tað er Umhvørvisstovan, sum viðger og útflýggjar umsóknirnar um vápnaprógv. Til hesa umsókn er serligt oyðublað. Á oyðiblaðnum skal upplýsast navn, bústaður, persónsnummar. Afturat oyðiblaðnum skal Umhvørvisstovan hava skjalváttan uppá, at viðkomandi hevur staðið royndirnar, ið skulu takast á skeiðnum.

**Vápn í sambandi við ítrótt**
Tá skotvápn verða nýtt í sambandi við ítrótt, er einki aldursmark. Treytin er tó, at skjótingin fer fram undir eftirliti av góðkendum skjótivegleiðara. Skjótivegleiðarin hevur tá ábyrgd av teimum ungu. Í hvørjum einstøkum føri skal skjótivegleiðarin meta, um tey ungu kropsliga og mentalt eru klár at læra at skjóta.

Vápnaprógvið og umheimurin

Í løtuni er vápnaprógvið og vápnatrygdarskeiðið ikki góðkent uttanfyri Føroyar. T.v.s. at vápnaprógvið kann ikki nýtast sum loyvi at hava og nýta skotvápn uttanlands ella at flyta vápn millum lond, men hetta verður næsta stig, sum myndugleikarnir í Føroyum fara at arbeiða við.

**Øll vápnalógin finst á hesari slóð:**
http://www.logir.fo/Logtingslog/43-fra-22-05-1969-um-vapn-vm--om-vaben-mv-sum-broytt-vid-logtingslog

**Kunngerðin um at skráseta vápn:**
http://logir.fo/Kunngerd/74-fra-28-06-2016-um-skraseting-av-skotvapnum

**Treytirnar fyri at standa skeiðið**
Treytirnar at standa skeiðið eru, at skeiðsluttakarin møtir 100% upp til alla undirvísing, at skeiðsluttakarin svarar rætt uppá minst 15 av teimum 20 spurningunum, sum settir verða til ástøðiligu royndina, og at báðir vegleiðararnir meta, at luttakarin trygt dugir at handfara skotvápn til verkligu royndina.

Kapittul 2:
# Vápnakunnleiki og vápnatrygd

Í øðrum broti fara vit at greiða stutt frá, hvat ein byrsa er, hvør munur er á teimum ymisku sløgunum, og hvat er týdningarmikið at ansa eftir viðvíkjandi teimum ymsu sløgunum.
Av tí at nýmótans luftbyrsur eru broyttar nógv, borið saman við tað, sum fyrr varð skotið við í kjallaranum, verða hesar eisini fevndar av nýggju vápnalógini, og vit koma tí nakað inn á hetta evnið. Eisini verður vanliga vápnatrygdin viðgjørd.

**Luftbyrsur**
Tað eru stórar broytingar hendar innan luftbyrsuøkið seinastu tíðina, og nógvar kunnu sammetast við salongriflur í megi. Tí er tað týdningarmikið at hava innlit í, hvat ein luftbyrsa er, og hvussu ein ansar sær á hesum øki. Fleiri sløg av luftbyrsum finnast, men mest vanligu eru annaðhvørt fjaðrabyrsur ella lufttrýstbyrsur (PCP-byrsur).



*Dømi um fjaðrabyrsu*

**Fjaðrabyrsur**
Fjaðrabyrsur taka vanliga einans eitt skot, og skulu spennast millum hvørt skotið.
Flestu fjaðrabyrsur eru av slagnum “Break Barrel”, ið merkir at fyri at spenna hana, verður pípan snarað niður. Eisini finst “Underlever”, ið hevur eina stong at spenna byrsuna við. Hesar kunnu vera neyvari, men eru sjáldan líka kraftmiklar, av tí at har er minni at spenna við.

Tá ein fjaðrabyrsa verður snarað niður, verður ein fjøður spent, umframt at atgongd fæst til kamarið, har høglið verður ísett. Fyrimunirnir við hesum eru, at tær eru ómakasleysari, tí tær krevja ongan eykaútbúnað og eru bíligari.
Tó eru eisini nakrir vansar við hesum slagi, so sum:
Tær hava vanliga væl minni orku
Tær taka (vanliga) einans eitt skot, og mugu løðast ímillum hvørt skotið
Av tí at har er ein fjøður, ið flytir seg, hava tær afturslag, ið ávirkar neyvleikan á skotinum



*PCP-byrsa (lufttrýstbyrsa)*

**Lufttrýstbyrsur (PCP-byrsur)**
PCP-byrsur hava í seinastuni vunnið nógv fram her í Føroyum, og tað er ikki uttan orsøk. Hesar hava oftast væl størri orku og kunnu skjóta fleiri skot, uttan at tað skal løðast ímillum.

PCP stendur fyri Pre Charged Pneumatic. Tað merkir, at byrsan hevur ein tanga, ið verður fyltur við luft (oftast ml. 200 og 250 bar!). Hetta høga trýstið ger, at byrsan er sera kraftmikil.

Dømi um eina PCP byrsu:

**Kalibur og lóður**
Kalibur á luftbyrsum er tvørmátið á høgli, ið skotið verður við; mátað í antin tummum (“) ella millimetrum (mm). T.d. hevur eitt kalibur 22 eitt tvørmát á 0,22” ella 5.5 mm. Luftbyrsur skjóta við smáum høglum, ið vanliga vera mátað í grammum ella “grains”.



*Dømi um ymisk høgl*

Tá lóður skal veljast til luftbyrsu, er týdningarmikið, at tað passar til byrsuna. T.e. fyri tað fyrsta, at tey hava sama tvørmát og eisini hava eina vekt, ið hóskar til orkuna á byrsuni.

Tess tyngri høglini eru, tess betur halda tey megina, meðan tey ferðast. Men tey hava eisini eina lægri útgangsferð og missa tí hædd skjótari. Eisini er týdningarmikið, at høglini ikki vera so mikið løtt og ferðast so skjótt, at skotið brýtur ljóðmúrin. Gera tey tað, vil byrsan umframt at larma væl meira, vera væl minni neyv, av tí at høglini ikki hava skap til “supersonic flight”.

Høgl finnast í alskyns sniðum, og at velja rætt snið er ein vísind fyri seg. Summi egna seg betur til veiðu, summi til "neyvleikaskjóting" og líkandi. Viðmælt verður tí, at roynt verður at finna tey høgl, ið hóska júst til tína byrsu.

Slagmegi merkir, hvussu nógva orku høglið hevur, sum er treytað av ferð og vekt á høglinum, og tað verður vanliga mátað í joule. Meðan eldri fjaðrabyrsur sjáldan fóru uppum 10 joule í slagmegi, fáast nýmótans luftbyrsur heilt upp í 40 joule, og PCP-byrsur liggja ofta um 100-150 joule, men tær kunnu fáast upp um 700 joule. Til samanbering hevur ein salongrifla millum 120 og 180 joule.

Slagmegi kann roknast við hesum frymli:

$$\left(E_k = \frac{\tfrac{1}{2} \times m \times v^2}{1000\,\frac{g}{kg}}\right)$$

har m er vektin á høglinum í grammum, og v er ferðin á høglinum í m/s.

**Trygd í sambandi við luftbyrsur**

Í flestu londum verður lógin fyri luftbyrsur lagað til eftir antin kalibri ella slagmegi. T.d. krevst í Danmark vápnaloyvi fyri luftbyrsur við einum høgltvørmátið yvir 5,5 mm og/ella einari slagmegi yvir 14 joule.

Í Føroyum krevst vápnaloyvi fyri høgltvørmát yvir 5,5 mm, meðan slagmegin ikki verður regulerað. Hetta merkir, at luftbyrsur við einari slagmegi á fleiri hundrað joule eru lógligar, og vit mugu tí vera sera varin við luftbyrsum!

Tað er vert at hava í huga, at høglini til luftbyrsur hava eitt øðrvísi skap enn projektilini frá vanligum riflum. Hetta merkir, at høgl missa ferð og flog væl skjótari enn projektilini. Tó er trygdarfrástøðan á flestu luftbyrsum væl hægri enn við høglbyrsum, og nevnast kann, at royndir skjúttar megna at drepa fugl við byrsumáli upp á 150 metrar við einari kraftigari PCP-byrsu.

Tí er tað sera týdningarmikið at kanna eftir, hvat er aftanfyri málið, ið skotið verður eftir.

**Høglbyrsur**

Flest allir føroyingar hava atgongd til ymiskar høglbyrsur. Tí er tað sera umráðandi at kenna tey ymsu sløgini. Vit hava vanliga fýra ymisk sløg av høglbyrsum í Føroyum.

*1. Yvir og undir*
*2. Lið um lið*
*3. Pumpgun*
*4. Hálvautomatisk høglbyrsa*



# Kalibur, boring o.a.

**Kalibur**
Borið saman við riflur, har kalibur vanliga sigur frá innara tvørmáti á byrsupípuni, verður í høglbyrsum brúkt mátið “gauge”.

“Gauge”-kalibrið verður allýst sum:

*“The gauge number is determined by the weight, in fractions of a pound, of a solid sphere of lead with a diameter equal to the inside diameter of the barrel.”*

Hetta merkir, at tess minni talið er, tess størri er patrónin. Mest vanliga kalibrið í Føroyum er kalibur 12, 16 ella 20.

**Boring og kjók (choke)**
Boring verður brúkt til at stilla trongleikan í pípuni og á tann hátt at vísa, hvussu nógv byrsan spjaðir. Ein byrsa kann antin vera fastborað ella hava kjók, ið kunnu skrúvast úr og skiftast.

Kjók verða vanliga mátað í tummum ella mm, og tað sigur okkum, hvussu nógv pípumúlin smalkar. Tess trengri kjók, tess tættari setur byrsan, og av tí sama ber hon longur.

Heiti á kjókum og skjótifrástøða:



*Dømi um kjók, ið sita uttan*

| Heiti | Stytting | Skjótifrástøða |
|---|---|---|
| Cylinder | Cyl | 18 m |
| Skeet | SK | 20 m |
| Improved Cylinder | IC | 22,5 m |
| Light Modified | LM | 27,5 m |
| Modified | M | 30 m |
| Improved | IM | 32,5 m |
| Light Full | LF | 35 m |
| Full | F | 35 m |
| Extra Full | XF | 40 m |

Vert er tó at hava í huga, av tí at stálhøgl ikki missa skapið eins og blýggjhøgl, spjaðast stálhøgl væl minni. Av somu grund verður mælt til ikki at brúka eitt ov trongt kjók, tá skotið verður við stálið, tí tað kann skaða byrsuna.

Ein tummilsregla er, at tá skotið verður við stálhøglum, svarar spjaðingin av høglunum til at fara eina kjókstødd upp. Eitt gott hugskot er at gera nakrar royndir við sokallaðum skotbíløtum. Tá setur tú eina talvu 1x1 metur upp við einari frástøðu uml. 30 metrar. Síðani verður skotið mitt á talvuna. Tá sæst týðuliga, hvar høglini raka, og um skotbílatið er pent ella ljótt. Sera ymiskt kann vera, hvussu skotbíløtini síggja út frá byrsu til byrsu, sjálvt um skotið verður við somu patrón.

**Kamarlongd og lóður**
At lóðrið passar til byrsuna, er sjálvsagt týdningarmikið. Í hesum brotinum fara vit tí at gjøgnumganga, hvat er umráðandi at hava í huga.



*Patrónhylki verða væl longri, eftir at patrónin er skotin*

**Kamarlongd**
Kamarið á eini høglbyrsu er tað aftasta pettið á byrsupípuni, har patrónin verður sett í. Á (flest) øllum byrsum stendur kamarlongdin stemplað á byrsupípuni. Hetta mátið fortelur, hvussu langar patrónir byrsan kann taka.

Tað er ikki nóg mikið, at patrónin passar í, tí byrsan skal eisini vera góðkend til hesa støddina. Hetta er tí, at patrónin er afturlatin sum ein stjørna, og hon verður tí longri, tá hon verður skotin.

Vanliga taka byrsur 70 mm (2,75”), 76 mm (3”) ella 89 mm (3,5”), men serliga eldri SxS taka ofta bara 67.5 mm (2,5”) - Verið tí varin.

**Lóður**
Á øllum lóðri eru nøkur mát, ið tað er umráðandi at leggja sær í geyma. Tey eru:
Kalibur
Longd
Høglvekt
Høglstødd
Trýst
Tilfar

**Kalibur**
Kalibur (Gauge): Hetta fortelur okkum um breiddina av patrónini sjálvari. Tað má vera tað sama sum byrsan.

**Longd**
Longd: er longdin á patrónini sjálvari – Henda longd skal samsvara við kamarlongdina á byrsuni sjálvari. Minni patrónir passa tó í byrsur við størri kamarlongd.

**Høglvekt**
Høglvektin fortelur okkum, hvussu nógv gramm av stáli ella blýggi er í patrónini. Til ítróttaskjóting verður vanliga brúkt 24 ella 28 gramm, ið er ríkiligt til at bróta dúgvurnar. Tyngri høglvektin er, tess fleiri høgl eru í patrónini. Hetta gevur sjálvsagt betri møguleikar fyri at drepa djórið ella bróta dúgvurnar. Tað merkir tó eisini, at byrsan slær meira.

**Høglstødd**
Høglstøddin verður givin í tølum, vanliga frá 9 og upp til 0. Høgl við støddini 0 eru tey størstu høglini. Hægri talið verður, minni gerast høglini.

T.d. er støddin á einum 7-høgli 0.1” í tvørmáti, ið er áleið 0,254 mm. Hvørja ferð talið minkar, veksur støddin við 0,01”. Høglstøddin er týdningarmikil at vita, tí at trygdarfrástøðan er treytað av henni.

Trygdarfrástøðan verður nevniliga definera sum høglstødd (í mm) falda við 100 metrum. T.d.

Høgl nr. 7 = 2.5 x 100 = 250 m
Høgl nr. 9 = 2.0 x 100 = 200 m

Tess størri høglini eru, tess meira orka er í hvørjum einstøkum høgli, og tey bera longur, men har eru eisini færri høgl í, og tí verður longri millum høglini.

*Ymiskar patrónir í ymiskum støddum*



| Høglstødd | 9 | 8 | 7 | 6 | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | B | BB |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Diametur (tummar) | 0,08 | 0,09 | 0,1 | 0,11 | 0,12 | 0,13 | 0,14 | 0,15 | 0,16 | 0,17 | 0,18 |
| Diametur (mm) | ,203 | ,229 | ,254 | ,279 | ,305 | ,330 | ,356 | ,381 | ,406 | ,432 | ,457 |
| Mongd blýg-gjhøgl pr. gramm | 24,025 | 16,838 | 12,321 | 9,24 | 6,982 | 5,544 | N/A* | 3,696 | N/A | N/A | 2,053 |
| Mongd stálhøgl pr. gramm | N/A | 23,697 | 17,249 | 13,019 | 9,980 | 7,885 | 6,325 | 5,134 | 4,230 | 3,532 | 2,957 |
| Tryg-dar-frástøða | 203 m | 229 m | 254 m | 279 m | 305 m | 330 m | 356 m | 381 m | 406 m | 432 m | 457 m |

**N/A= Tal ikki funnið*

Legg til merkis, at trygdarfrástøða og skotmál IKKI er tað sama – Trygdarfrástøðan er sjálvsagt væl størri enn skotmálið.

**Vanlig nýtsla av høglstøddum**
7-9: Leirdúgvur
4-6: Fugl
2-5: Hara

**Trýst**
Umframt kalibur og longd er hetta helst týdningarmiklasti parturin at ansa eftir. Tað er sera umráðandi, at patrónin ikki hevur eitt hægri trýst, enn byrsan er góðkend til.

Tíanverri finnast fleiri standardir at máta hetta trýstið, og enn fleiri mátar at stempla á byrsuna, hvat hon klárar. Tí verður viðmælt, at tit sjálvi finna stemplið á byrsuni og kanna, hvat hetta svarar til í trýsti, og síðani lesa á patrónpakkanum, hvat trýst lóðrið hevur.

**Tilfar**
Vanliga verða stál ella blýggj nýtt til høgl. Av tí at blýggj er bleytari, springa blýggjhøgl ikki aftur uppá sama máta sum stálhøgl gera. Umvent dálka tey væl meira, og tí kunnu avmarkingar verða á, hvar loyvt er at brúka blýggjhøgl, men hetta er mest uttanlands.




Henda eskjan við patrónum hevur allar upplýsingar, ið eru neyðugar at vita um lóðrið.

1 *Kalibur*
2 *Patrónlongd*
3 *Høglvekt*
4 *Tvørmát á høglum*
5 *Stødd á høglum*
6 *Ferð á høglum*
7 *Hægsta trýst*
8 *Mongd av høglum í partrón*
9 *Tilfar*
10 *Merkiseðil við neyðugum ávaringum*

**Hvussu er ein høglbyrsa bygd upp og sett saman**
Í hesum broti fara vit at gjøgnumganga teir ymsu partarnar í eini høglbyrsu; hvussu teir eita, og hvussu teir vera viðlíkahildnir.

**Yvir og undir og lið um lið**
Hesar byrsur hava vanliga fýra høvuðslutir:

1 Forskefti
2 Bakskefti
3 Pípa
4 Lásihúsi (baskyla)




Eftir vanliga nýtslu verður byrsan tikin sundur í hesar lutir, sum verða turkaðir av og smurdir í olju ella feitti.

Viðmælt verður tó árliga at taka lásihúsan frá bakskeftinum og reinsa teir smærru lutirnar:

1 Avtrekkjari
2 Hani
3 Slagstift
4 Sikring




Her síggja vit lutirnar, ið allir kunnu reinsast og smyrjast. Vanliga eru tað slagstiftirnar og fjaðrarnar, ið slítast og skulu skiftast.

**Hálvautomatisk byrsa og pumpgun**
Hesar hava vanliga fleiri lutir, ið allir skulu reinsast og smyrjast. Á myndini niðanfyri, ið er úr eini manual frá Browning, síggjast lutirnir, ið vanliga skulu reingerast.





*Á summum byrsum er møguligt at stilla skeftið*

**Skefti**
Uttan mun til hvat slag av byrsu talan er um, er tað týdningarmikið, at byrsan er lagað til skjúttan, av tí at, tá skotið verður við høglbyrsum, er ikki tíð at sikta á sama hátt, sum tá skotið verður við riflu ella luftbyrsu.

Tann lættasti mátin at fáa eina byrsu at passa er við at kanna skeftið, sum kann styttast/leingjast og hækkast/lækkast umframt snarast. Eisini ber til at fáa skefti, ið kunnu stillast. Hetta kann vera ein stór hjálp at fáa byrsuna at liggja áraka eygað.

**Skjótiteknikkur**
Tá ein persónur skjýtur við høglbyrsu, verður siktið ikki nýtt á sama hátt sum á riflu. Ístaðin verður byrsan tikin upp (montera), og skotið verður eftir tí fluktandi málinum. Tí er rættur teknikkur umráðandi.

**At taka byrsuna upp**
Umráðandi er at gera skjótt av, tá skotið verður eftir málum, sum førka seg t.d. hara og fuglur. Tí eru eini góð ráð at venja heima – sokallaða turrvenjing uttan lóður. Venjast skal, at byrsan skjótt og uttan trupulleikar fæst upp til kjálkan, og at eygað, ið siktar, fluktar við pípuna. Hugsast skal eisini um, at vektin er á fremra beininum.

**At leggja uppfyri**
Av tí at málið, ið skotið verður eftir við høglbyrsu, vanliga flytur seg, er tað ikki nóg mikið at peika beint á málið. Ístaðin má ein leggja nakað uppfyri, áðrenn skotið verður, ella sagt á annan hátt, tað skal skjótast eitt sindur frammanfyri málið. Ein partur av at læra at skjóta er tí at læra at meta um, hvussu skjótt málið flytur seg, hvønn vegin tað flytur seg, og á tann hátt meta um, hvussu nógv skal leggjast uppfyri. Hvussu nógv lagt verður uppfyri, kann verða ringt at meta um, men má ístaðin venjast.

**Hvat eyga stýrir**
Tá skotið verður høgrumegin við byrsu, siktar tú við høgra eyga. Tað er tó ikki óvanligt, at hóast tað fellur natúrligt at skjóta við byrsuni høgrumegin, so er tað vinstra eygað, sum stýrir. Er hetta so, kann tað vera trupult at raka, tí "skeiva" eygað hevur hug at taka yvir. Ofta vita fólk ikki, hvat eyga er tað stýrandi. Hetta kann tó lættliga kannast við einari lítlari roynd: Hygg at einum føstum punkti nakað burtur frá við báðum eygunum. Peika síðani við útrættum armi eftir punktinum framvegis við báðum eygunum. Síðani verður høgra eygað latið aftur. Um tú nú peikar høgrumegin punktið, so stýrir høgra eygað.

Hvat er so at gera, um tú vilt skjóta høgrumegin, men vinstra eyga stýrir? Her kunnu verða fleiri loysnir. Lættast er at lata vinstra eygað aftur, tá skotið verður, ella fara í brillur, har okkurt er fyri glasið vinstrumegin. Ein onnur loysn er at læra seg at skjóta vinstrumegin. Hetta kann tykjast møtimiklari, men gevur í longdini betri úrtslit.

At ganga við vápni krevur bæði ábyrgd, virðing og

*Á fyrru myndini er byrsan tikin rætt upp.*
*Á seinnu myndini liggur kjálkin ikki niður á skeftið*





Kapittul 3:
# Vápnatrygd

skil. Hetta er sjálvsagt galdandi bæði á breyt, í haga og á báti, ja allastaðni.

Tað eru fleiri høvuðsreglur galdandi, tá tað snýr seg um vápnatrygd, og tvær tær týdningarmestu eru:

1. Ein afturlatin byrsa er at rokna sum ein lødd byrsa. Ein afturlatin byrsa skal ongantíð peika móti nøkrum, sum ætlanin ikki er at skjóta eftir.
   Tá tað snýr seg um hálvautomatiska byrsu og pumpgun, er ein slík at rokna sum ein lødd byrsa, so leingi botnstykkið ikki er hálað aftur, og kamarið er opið og tómt. Botnstykkið er ein slá á síðuni á hálvautomatiskum byrsum, har patrónirnar verða koyrdar í.

2. Hvørja ferð byrsan skal takast fram og nýtast, skal byrsan opnast og eftirkannast fyri at tryggja, at hon ikki er lødd og er í vandaleysum standi. Hetta skal gerast uttan at peika verður á nakað, sum ikki ætlast at skjótast.

### Upp- og afturlating av byrsu
Tá byrsa verður tikin úr stativi, skal byrsan lyftast við múlanum uppeftir og latast upp, meðan hon peikar uppeftir, soleiðis at byrsan er opin, tá farið verður við henni.

Sama er galdandi, tá byrsa verður tikin úr húsa, tá skal múlin venda niðureftir, og byrsan latast upp, meðan múlin peiggjar niðureftir.

Sama er galdandi, tá byrsa skal latast aftur. Áðrenn byrsan verður latin aftur, skal byrsan kannast, um hon er tóm, t.v.s. at hyggjast skal, um byrsupípan er tóm (eisini soleiðis at onnur síggja). Síðan skal byrsupípan venda uppeftir, meðan byrsan verður latin aftur. Um byrsan verður sett í húsa, skal byrsupípan venda niður í húsan, tá byrsan verður latin aftur.

### Sikringin
Orðið "sikring" verður ofta misskilt. Sjálvt um sikringin á eini byrsu er sett til (á "on"), merkir tað ikki, at byrsan er "sikrað" ella trygg. Flestu byrsur til veiðu hava eina sikring, sum "sikrar" byrsuna, hvørja ferð hon verður latin upp. Ein slík sikring ger ikki byrsuna trygga, sikringin tryggjar bert avtrekkjaran. Fær byrsan ein stoyt, er stórur vandi fyri, at skotið gongur av. T.v.s. at sjálvt um sikringin er sett til, so er ein afturlatin byrsa at meta sum ein lødd byrsa.

Tað eru oftast byrsur til veiðu, sum hava automatiska sikring. T.v.s. at tá byrsan verður latin upp, fer sikringin sjálv á "on", og sirkingin skal tí setast á "off", áðrenn skotið kann latast av. Byrsur til ítrótt t.d. leirdúgvuskjóting o.l. hava sum oftast ikki automatiska sikring.

Tá ein slær sikringina frá, skal hetta gerast við at brúka tummilfingurin, og um tummilin ikki flytur aftur fyri at fáa eitt trygt tak um byrsuna, kann byrsan vera minni trygg at handfara, tí tá er skjótari at missa byrsuna ella tamarhaldið á henni.

Sikringin kann tó vera ein eyka trygd, tá gingið verður í haga, ella um tú ert á báti, men havast skal altíð í huga, at sikringin ger ikki byrsuna trygga. Hinvegin vísir tað seg oftani, at ein skjútti vísir trygdini størri ans, tá byrsan ikki hevur automatiska sikring.

### Løðing og avløðing
Ein byrsa skal sum meginregla ikki løðast, fyrr enn beint áðrenn ætlanin er at skjóta.

Á skjótibreyt skal byrsan ikki løðast, fyrr enn skjúttin stendur á plássinum, skotið verður frá, og skjúttin vendir tann vegin, skotið skal latast av.

Í haga og á báti er hetta ofta ikki so lætt, tí tá fólk t.d. eru á haruveiðu, er oftast neyðugt, at byrsan er lødd, meðan gingið verður. Her er tað sera týðandi, at veiðumenn, ið t.d. hava havt ein steðg saman, ikki løða byrsurnar aftur, fyrr enn komið er frá hvørjum øðrum. Eisini er tað neyðugt alla tíðina at hugsa um, at byrsan ikki vendir tann vegin, menn kunnu hugsast at vera ella ganga, t.d. handan eina sýn o.l.

Byrsan skal altíð avløðast, áðrenn menn møtast á veiðu, ella tá menn skulu um áir, upp um stik og líknandi støð, tí tá er vandi fyri, at byrsan ikki verður hildin trygt.

Á skjótibreyt skal byrsan altíð avløðast, áðrenn farið verður av plássinum, ið skotið verður frá, og áðrenn skjúttin vendir sær á plássinum.

### At seta byrsu frá sær
Legg ongantíð eina byrsu á t.d. eitt borð, uttan so at byrsan er opin.

Legg ongantíð eina byrsu tilvildarligt á vøllin. Um tú leggur byrsuna frá tær, so skalt tú ansa eftir, at tað er væl vallað, og at byrsan er opin og ólødd – hetta bæði fyri trygdina og fyri byrsuna.

Set ongantíð byrsu frá tær upp móti t.d. einum bili, veggi, steini, stiki o.s.fr., uttan so at byrsan er opin.



*Byrsan skal liggja væl og vera opin, ella t.d. standa í einum stativi á skjótibreyt*

**Patrónfeilir**
Tað kemur meira enn so fyri, at skotið ikki gongur av, tá skotið verður. Hetta kann koma av ymiskum grundum. Tað kann skyldast brek í byrsuni, at t.d. slagstiftin ikki slær nóg hart á patrónina, ella onnur brek eru við byrsuni. Eisini kann byrsan vera skitin innan, soleiðis at slagstiftin ikki slær beinanvegin, men eina løtu seinni. Hetta kann sjálvsagt vera sera vandamikið.

Tað kann eisini vera eitt brek í patrónini, soleiðis at sjálvt um byrsan riggar, sum hon skal, og slagstiftin slær nóg hart, so kann tað henda, at skotið gongur av eina góða løtu eftir, at byrsan klikti.

Um skotið ikki gongur av, eigur skjútti ikki at taka byrsuna niður beinanvegin, men hann eigur at halda byrsuni uppi og burturfrá í 5 til 10 sekund, soleiðis at tað ikki hendir nakar skaði, um skotið kortini skuldi gingið av. Ikki fyrr enn tá kann byrsan takast niður, byrsan latast upp, og patrónin ella patrónir takast úr.

Maður eigur heldur ikki at hava fleiri sløg av patrónum uppi á sær, t.d. í sama lumma ella somu tasku. Hetta tí tað ikki er óvanligt, at ein koyrir t.d. eina kal. 20 patrón í byrsuna, sum so setir seg fasta onkustaðni mitt í byrsupípuni, og verður so ein kal. 12 patrón sett í byrsuna, og skotið verður, kann stórur skaði standast av hesum.





*Tað er av stórum týdningi at vísa hvørjum øðrum, at byrsan er trygg*

**At boða frá trygd**
Tað er ikki nóg mikið, at viðkomandi veit, at einki skot er í byrsuni. Tað hevur eisini týdning, at aðrir skjúttar føla seg tryggar í allar mátar. Hetta gerst sjálvsagt m.a. við, at byrsan ongantíð peikar móti nøkrum, ið tú ikki ætlar at skjóta og heldur ikki at peikað verður móti steinum, hellu e.l., har fólk gongur í nánd. Fyri at vísa, at byrsan er trygg og avlødd, skal byrsan vera latin upp, soleiðis at onnur kunnu vera vís í, at byrsan ikki er vandamikil.

Tá tað snýr seg um hálvautomatiskar byrsur og pumpguns, er mannagongdin eitt sindur øðrvísi. Trupulleikin við hesum byrsum er, at hjá øðrum enn skjúttanum sjálvum, er oftani ringt at siga, um byrsan er lødd ella ikki. Tí skulu hesar byrsur altíð haldast við múlanum peikandi beint upp í loft, og botnstykkið skal vera hálað aftur. Til hesar byrsur finst eisini ein leys plomba við einum litaðum strimli ella vimpli at seta í kamarið, soleiðis at byrsan er tryggjað, og at onnur enn skjúttin sjálvur týðuliga kann síggja, at byrsan ikki er lødd. Eisini kann ein klútur av onkrum slag brúkast at seta í kamarið.




*Á myndini sæst, at hesar byrsur eru tryggar*

**Slit og óreglusemi**

At ein byrsa er gomul, merkir ikki, at hon er ótrygg. Men ein slitin byrsa er ikki ein trygg byrsa. Byrsan er ótrygg, um hon t.d. er slitin í upp- og afturlatingini. Um hongsl og læsing eru slitin, kann tað henda, at byrsan ikki læsir, sum hon skal. Harafturat slær sikringin møguliga ikki til, sum hon eigur.

Rivur og eisini tær, sum eru ringar at síggja í skeftinum, kunnu vera orsøk til, at byrsan brotnar, tá skotið gongur av. Ein buklað, boygd ella slitin byrsupípa kann skrædna. Um deilirnir inni í lásihúsanum eru slitnir ella ov skitnir, kann tað hava við sær, at eitt skot ikki gongur av, tá skotið verður, men skotið kann so sagtans ganga av eina løtu aftaná, at byrsan klikti.

Tað kunnu vera nógv onnur viðurskifti, sum gera, at ein slitin byrsa er vandamikil, og tí er altíð umráðandi, at byrsan er í góðum standi, og at eigarin tryggjar sær hetta, áðrenn farið verður at skjóta.

Kapittul 4:

# Veiðilógin og trygd í sambandi við veiðu

Hesin partur snýr seg um, hvat vit kunnu veiða við skotvápnum, nær loyvt er at veiða og við hvørjum. Eisini verða trygdarviðurskifti viðgjørd í sambandi við veiðu. Tann vanliga fugla- og haruveiðan í Føroyum er við høglbyrsu. Við høglbyrsu er loyvt at veiða nøkur fuglasløg og haru. Vit hava eina løgtingslóg um fuglaveiðu og eina um haruveiðu, sum ásetur treytirnar fyri veiðu av hesum djórum.

**Fuglur**

Í fuglaveiðilógini §17 eru flest allir fuglar í Føroyum friðaðir fyri veiðu og skjóting, tó eru nøkur undantøk.

1. Alt árið er loyvt at skjóta kráku, ravn, kjógva, havhest, súlu og øll másasløg, tó ritu bert á sjónum.
2. 1. oktober – 20. januar er loyvt at skjóta álku, lomviga og lunda.
3. 1. oktober – 30. november er loyvt at skjóta skarv.

Seinastu árini hava sera nógvar grágæs verið í Føroyum. Fyri fleiri bøndur og onnur, sum fáast við at velta, hevur hetta verið ein trupulleiki. Í 2014 var løgtingslógin broytt soleiðis, at persónar, sum eiga ella leiga velt øki, kunnu søkja um loyvi at skjóta grágæs á økjum teirra. Tey, ið fáa loyvi, kunnu eisini loyva øðrum at skjóta fyri seg. Fleiri treytir fylgja við, og hesar síggjast allar í sjálvari lógini.

Tað er bert loyvt at veiða fugl við byrsum, sum í mesta lagi hava 2 skot. Harafturat er ikki loyvt at skjóta fugl sunnu- og halgidagar.

**Friðing**

Undir friðaðum fuglabjørgum, og tað eru næstan øll, er ikki loyvt at skjóta nærri enn 3 fjórðingar úr landi og hálvfjórðing hvørjumegin bergið í tíðarskeiðnum 15. mars til 31. august. Í sama tíðarskeiði er ikki loyvt at skjóta nærri friðari urð enn ein hálvfjórðing úr landi og hálvfjórðing hvørjumegin við. Heldur ikki er loyvt at skjóta nærri enn hálvfjórðing frá æðuvarpi í tíðarskeiðinum 1. mai – 25. oktober.

Øll fuglaveiðilógin finst her: *http://www.logir.fo/Logtingslog/27-fra-09-09-1954-um-fuglaveidu-vm-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-34-fra*

**Hara**

Løgtingslógin um haruveiðu er sera stutt. Loyvt er at skjóta haru í tíðarskeiðinum 2. november – 31. desember. Loyvt er at skjóta haru við høglbyrsu í dagslýsi allar gerandisdagar í loyvda tíðarskeiðnum. Ongar avmarkingar eru fyri, hvussu nógv skot byrsurnar kunnu hava.

Øll løgtingslógin um haruveiðu finst her: *http://www.logir.fo/Logtingslog/128-fra-25-10-1988-um-haruveidu--harejagt*

**Trygd í sambandi við veiðu**

Í Føroyum hava vit ikki hagtøl fyri skaðatilburðir í sambandi við skjóting. Men tað er eingin loyna, at javnan henda óhapp. Flestu av hesum eru ikki álvarslig, tó hava fleiri álvarsligir tilburðir verið í sambandi við skotvápn seinnu árini. Vit skulu tí her nevna tey vanligastu vandamálini í sambandi við veiðu á sjógvi og  landi.

**Trygd á sjónum**

Á sjónum verður bert fuglur veiddur við høglbyrsu. Ein av størstu vandunum, tá skotið verður á sjónum, er, at báturin livir í sjónum. Hetta ger, at avbjóðingin at raka verður størri, men avbjóðingin í sambandi við trygdina er enn størri. Best er, um tann, sum skjýtur, stendur frammi í skut, vendir frameftir og ikki skjýtur meira enn 90° ávikavist í stýri- ella bakborð. Tá hevur skjúttin gott útsýni, og aðrir persónar á bátinum eru ikki í vanda, men eru væl aftanfyri skotvinklarnar. Um skotið verður yvir borðini á báti, má skjúttin ansa eftir, at skotini alla tíðina eru út frá bátinum. Vil skjúttin skjóta frá hinum borðinum, skal byrsan avløðast, áðrenn skjúttin flytur í hitt borðið. Alla tíðina skal skjúttin hugsa um møguligar aðrar persónar umborð, hugsa um, at hann stendur væl, og at hann undir ongum umstøðum stillar ella leggur løðda byrsu frá sær. Eini góð ráð eru at hava byrsuna opnað, meðan bíðað verður, tí einki er at skjóta eftir. Tá er byrsan ikki vandamikil, og tá er skjótt at lata byrsuna aftur og verða klárur. Bert ein skjútti við byrsu má skjóta samstundis á báti, og løðd byrsa má ongantíð handast øðrum skjútta, tí um báturin knappliga rørist, kann hetta gerast sera vandamikið. Skal byrsa handast øðrum umborð, skal hon avløðast, so nýggi skjúttin sjálvur kann løða, tá hann metir, at trygdin er í lagi. Trygdarfrástøðan skal altíð virðast - eisini á sjónum. Sjálvt um skotið verður á skák móti sjónum, so kunnu høglini stikla eftir sjónum og vera vandamikil longur burtur, enn har peikað verður við byrsuni.



*Góðir skógvar, plagg, ið sæst væl, patrónbelti og trygdarbrillur. Tveir vælútgjørdir skjúttar.*

## Á landi

Á landi kunnu harur og ávísir fuglar veiðast við byrsu. Avbjóðingin í sambandi við trygdina á landi er fjølbroyttari enn á sjónum.

Um fleiri veiða saman, er góður siður, áðrenn veiðan byrjar, at avtala, hvussu gingið verður, og at grundleggjandi trygdarreglur verða gjøgnumgingnar. Hetta hevur serligan týdning, um nýggir skjúttar eru við á veiðiferðini. Allir skjúttar skulu vera væl útgjørdir. Her verður hugsað um, at fótbúnin er hóskiligur, og at skjúttin er í klæðum, sum síggjast væl av hinum skjúttunum. Fleiri skjúttum dámar væl at hava reim á byrsuni. Hetta er ikki alneyðugt, men kann verða sera hent, um geingið er vánaligt, og tað gerst neyðugt at hava hendurnar fríar. Patrónbelti kann viðmælast, tí við patrónbelti veitst tú, hvussu nógv skot eru eftir, tað er skjótt at løða, og tað er tryggari enn at hava patrónirnar í lummanum. Tað kann eisini viðmælast, at skotið verður í skjótibrillum, og at oyravernd verður nýtt.

Tá skotið verður í haga, eru nógv viðurskifti, veiðufólkið skal hugsa um. Hvussu er sýnið, hvar eru møguligir skjótifelagar, hvussu eru gongulíkindini, og er vandi fyri, at høglini sláast aftur á tann, ið skjýtur ella onnur? Grundleggjandi reglan er, at um skjúttin er í iva um nøkur av omanfyri nevndu viðurskiftum, so skal ikki skjótast.

Um møguleiki er fyri, at fólk eru t.d. handan eina sýn, er ikki ráðiligt at skjóta yvir sýnina. Oftani verður skotið, meðan fleiri skjótifólk ganga lið um lið. Tá er sera umráðandi, at trygdarvinklarnir verða virdir. Um ein skjútti skal venda sær við, má lødd byrsa ongantíð peika móti øðrum skjútta. Tí má skjúttin peika við byrsuni upp í loft, tá hann snarar sær á ella lata byrsuna upp, áðrenn hann vendir sær, fyri síðani at lata hana aftur, tá hann hevur vent sær. Lendið í Føroyum er ofta soleiðis

*Um neyðugt er at rætta einum øðrum byrsuna, skal hon altíð avløðast og vera opin*



*Tað kann vera hent at hava báðar hendurnar fríar*



háttað, at tað kann verða sera grýtut. Hetta kann føra við sær, at høglini kunnu sláa aftur ella fara í aðrar ættir, enn skotið verður, um høglini raka grót ella ís. Hetta ger seg serliga galdandi, um skotið verður við stálhøglum ella øðrum hørðum høglum enn blýggjhøglum. Skjótibrillur ella aðrar góðkendar trygdarbrillur eru ein sera góð verja móti hesum.

Um skjúttar ganga í brattlendi t.d. upp gjøgnum eitt bratt gil ella koma í geingi, har hált er, so eru ráðini altíð at avløða byrsuna. At sikra byrsuna er ikki nøkur trygd, tí um byrsan fær eitt slag, so er stórur vandi fyri, at hon gongur av, hóast sikringin er sligin til. Um skjúttin hevur fyri neyðini at leggja byrsuna frá sær t.d. í sambandi við steðgir, ella tá veiðan skal takast upp, so skal byrsan altíð avløðast. Fleiri dømi eru um, at byrsur eru farnar á glið ella dotnar, og tá er stórur vandi á ferð, um byrsurnar eru løddar. Eisini um skjúttar hittast á ferðini, so er góður siður at avløða byrsuna ella at lata byrsuna upp.

Neyðugt er hjá skjúttanum altíð at tryggja sær, at einki rusk o.l. kemur í byrsupípuna. Tað er ikki ókent, at mold ella kavi av óvart kemur í pípuna. Tí skal skjúttin altíð tryggja sær, at pípan er rein, tá skotið verður. Hetta ger seg serliga galdandi, um gingið hevur verið, har geingið er vánaligt, um kavi er, ella um skjúttin hevur lagt byrsuna frá sær. Um skotið verður, og t.d. kavi ella mold eru í pípuni, kann pípan spreingjast.

**Veiða við luftbyrsu**

Seinastu árini eru luftbyrsur vorðnar alt sterkari og beinraknari. Hetta hevur gjørt, at áhugin fyri luftbyrsum er vaksin sera nógv. Á lógarøkinum er eitt sindur ógreitt, hvat luftbyrsur skulu brúkast til annað enn at skjóta til máls. Men sum lógin er skrúvað saman nú, er einki í vegin fyri t.d. at skjóta sitandi fugl við luftbyrsu. Í hesum føri skal havast í huga trygdarfrástøðurnar, sum eru umrøddar frammanfyri.

**Djóravernd og náttúruvernd**

Tað er av stórum týdningi, at farið verður fram við skili, tá roynt verður at taka lív av djórum, eisini tá talan er um veiðu. Tí er umráðandi, at hugsað verður um frástøðuna til málið. Er ivasamt, um t.d. ein hara er uttanfyri skotmál, so er best ikki at skjóta, tí sannlíkindini fyri bert at særa haruna eru ov stór. Um frástøðan er ov long, valdast eisini, hvussu trong pípan er, støddina og mongdina av høglum.

Tað er góður siður altíð at taka alt við sær aftur, sum ein hevur við sær út í náttúruna. Eisini skotnar patrónir. Nútímans patrónir eru gjørdar úr plastikki. Hesar verða tí ikki upploystar í náttúruni. Av óvart kann okkurt tómt patrónhylki verða liggjandi. Tá er umráðandi altíð at taka hesi við, um vit ganga okkum framá slík hylki. Somuleiðis um vit ganga okkum fram á proppar, sum verða skotnir út saman við høglunum, at vit altíð taka hesar upp. Á okkum, sum nýta náttúruna nógv, liggur ein serlig ábyrgd at halda náttúruna skaðafría av virksemi okkara.

*Tað er umráðandi at fara væl um náttúruna og taka patrónir og annað við sær heimaftur*





*Eitt góðkent vápnaskáp er ein góð íløga*

**Viðlíkahald av skotvápnum**

Eitt skotvápn er eitt amboð. Sum flest onnur amboð, so er neyðugt at fara væl við og at halda skotvápnið viðlíka, um hetta skal halda í fleiri ár og skal verða trygt. Allir lutir á byrsuni, sum kunnu førkast, skulu smyrjast av og á. Harafturat hevur pípan til tíðir gott av at fáa nakrar dropar av olju bæði innan og uttan. Umráðandi er at brúka góðkenda olju til hetta endamál. Brúk av skeivari olju kann skaða vápnið. Smyrjast skal í smáum nøgdum, og avlopsolja skal turkast avaftur. Ikki er neyðugt dagliga at smyrja byrsuna inni í afturlatna lásihúsanum, men neyðugt kann vera viðhvørt at reinsa og smyrja lutirnar inni í lásihúsanum. Títtleikin valdast sjálvandi av, hvussu nógv byrsan verður brúkt. Ein vælsmurd byrsa slítist seinni og rustar ikki. Tað er eisini neyðugt at halda skeftini viðlíka, um hesi eru úr træ. Træskefti skulu av og á smyrjast við olju, sum er gjørd til endamálið. Um skeftini gerast ov turr, so kunnu tey lættari støkka og brotna.

Best er altíð at turka eftir byrsuni og møguliga smyrja hana, tá hon hevur verið brúkt. Serliga umráðandi er hetta, um byrsan hevur verið umborð á báti. Tá skal byrsan reinsast og turkast beinanvegin eftir, at hon er komin í land, tí saltrákin á sjónum er sera ringur fyri byrsur. Av somu orsøk verður tað staðiliga frárátt at goyma byrsur umborð á báti.

Rustaðar byrsur, byrsur, har pípan hevur buklur, byrsur, sum skinkla í liðunum og byrsur, sum yvirhøvur hava sjónlig brek, eru ikki tryggar at nýta. Hesar skulu burturbeinast ella latast inn til umvælingar.

Byrsur og lóður skulu goymast turt og trygt, og har børn og óviðkomandi ikki sleppa framat. Skilagott er at goyma lóður og skotvápn á hvør sínum staði. Ofta verða vápn og lóður goymd t.d. á ovastaloftum. Hetta verður ikki mett at vera ein góð loysn, tí ráligt kann verða á ovastaloftum, og ikki altíð er vist, um loft kunnu steingjast av. Fleiri og fleiri vápnaeigarar útvega sær serlig vápnaskáp, sum kunnu steingjast og setast føst í veggin. Fleiri av hesum hava eisini serlig rúm til lóður, sum kunnu steingjast fyri seg.

**Óhapp**

Tá vit umgangast vápn, eru úti í náttúrini ella bæði samstundis, so er altíð vandi fyri, at óhapp kunnu henda. Tí er so neyðugt, at trygdin altíð kemur í fremstu røð. Men hvat er at gera, um onkur kemur út fyri óhappi á veiðiferð? Ynskiligt er sjálvandi, at øll, sum ferðast í náttúruni, ja øll yvirhøvur, hava tikið skeið í fyrstuhjálp, men soleiðis er veruleikin bara ikki. So her koma bert nøkur grundleggjandi góð ráð, sum altíð áttu at verið fylgd.

Tá farið verður út í náttúruna á veiðiferð ella bert ein túr, so skal altíð boðast onkrum øðrum frá. Sigast, hvar farið verður, og nær viðkomandi væntar at verða aftur. Hetta er sera umráðandi, serliga um persónur fer einsamallur út í náttúruna.

Havið altíð fartelefon við.
Havið bjørt sjónsk klæði við
Takið ongantíð óráð fyri.

Kapittul 5:

# Verkligar venjingar og royndir

Í hesum parti av skeiðnum verður undirvíst í, hvussu farið verður um vápn í ymiskum førum. Her verður greitt frá, hvørjar venjingar skulu gerast, og hvørjar royndir skulu standast. Venjingarnar verða gjørdar á skjótibreyt, úti í náttúruni, men eisini innandura. Eisini kann vera víst, hvussu ymiskar skotmyndirnar kunnu vera við ymiskum patrónum og høglstøddum og við at nýta ymiskar boringar ella kjók.

**Venjing 1**
At byrja við verður víst, hvussu byrsur skulu liggja í bili, havast innandura, og hvussu byrsur skulu handfarast, tá tær verða tiknar úr byrsueskju ella byrsutasku.

**Venjing 2**
Síðani verður farið við skeiðsluttakarum á skjótibreyt. Um luttakaratalið er stórt, verða luttakararnir býttir í bólkar við 4-6 luttakarum í hvørjum. Bert ein byrsa má brúkast í senn. Her verður greitt frá, hvørjar trygdarreglur eru galdandi á breytini, hvussu skotvápnið skal berast, nýtast og setast frá sær. Her verður víst, hvussu løtt verður, og hvussu ein skal fyrihalda seg á skjótibreyt, tá byrsan er lødd. Eisini verður víst, hvussu gerast skal, um skotið verður, men skotið ikki gongur av. Allir luttakarar skjóta 30 skot eftir flúgvandi ella rullandi leirdúgvum – her skulu minst tvey ymisk dømi vera. Best er, um luttakararnir ikki skjóta øll 30 skotini beinanvegin, men ymisku luttakararnir skiftast, so til ber at eygleiða hvønn annan.

**Venjing 3**
Eftir at hava vant á skjótibreytini verður farið í náttúruna. Hetta kann t.d. verða hagalendi nær við skjótibreytina. Her verður víst, hvussu tryggast er at gera, tá skjúttar koma í ymiskar støður í náttúruni, t.d. tá farið verður um eina hála á, tá klatrað verður um eitt stik, og tá tveir skjúttar hittast í haganum. Endamálið er, at skjúttin lærir at meta um støður, sum kunnu gerast vandamiklar.

**Skotmynd**
Um stundir eru til tess, er eitt gott hugskot at gera nakrar skotmyndir, sum vísa, hvussu ymisk skotbíløtini eru frá byrsu til byrsu, kjók til kjók og frá patrón til patrón. Ein talva uml. 1x1m verður sett upp við uml. 30 metra frástøðu. Síðani verður eitt pappír spent uttaná, og eitt skot verður latið av. Síðani verður pappírið skift út. Ein onnur byrsa ella eitt annað kjók verður brúkt, men sama patrón, og so verður skotið aftur. So er bara at bera saman skotmyndirnar. Tað kann vera sera áhugavert at royna ymiskar patrónir fyri at finna ta bestu patrónina til egna byrsu.

**Verkliga royndin**
Tá hesar venjingar eru lidnar, skulu allir luttakararnir til verkliga roynd. Skjótast skal eftir 30 dúgvum, har dúgvurnar ferðast upp á tveir ymiskar mátar. Her skal skeiðsluttakarin vísa, at hann trygt dugir at handfara vápnið, áðrenn skotið verður, tá skotið verður, og eftir at tað hevur verið skotið.

Eftir hetta skulu luttakararnir vísa í lendi, at teir trygt duga at ganga í náttúruni við byrsu. Henda royndin kann verða gjørd av einum luttakara í senn, ella at tveir luttakarar fylgjast. Luttakarar fáa at vita, hvørja leið teir skulu ganga, síðani fáa teir eitt skotvápn við snýtipatrónum í. Meðan teir ganga, elta vegleiðararnir teir, gera viðmerkingar og seta møguliga spurningar.

Eftir royndina fær luttakarin beinanvegin at vita frá skjótivegleiðarunum, um hann hevur staðið.

*Skjúttar gera royndir við skotmyndum*



